# Klaksvíkin sjóðar av Summarfestival

**Tað man vera ein av heitastu døgunum í Føroyum í summar, og allastaðni í býnum er ein sjóðan av lívi. Klaksvíkingar eru av álvara í gongd við seinastu fyrireikingarnar til Summarfestivalin í vikuskiftinum**

SUMMARFESTIVAL
*Anna V. Ellingsgaard,*
*anna@sosialurin.fo*

Úti á nýggja tjaldingarplássinum úti í Grøv ganga fólk og seta skelti upp, menn frá SEV eru í fer við at leggja kablar við eyka streymi fram við pallinum í Vágsbø, Norðlýsi er kemur við eykaútgávu og býargartnarin og hansara fólk eru at síggja allastaðni.

Tað er bert eitt lítið døgn, til fyrstu tónarnir á Summarfestivalinum verða at hoyra, og Steintór Rasmussen, samskipari, tykist óvanliga avslappaður.

- Í løtuni taka vit tað rættiliga róligt, men tað er fyrst og fremst tí vit fáa so ótrúliga góða hjálp allastaðni frá. Eitt er at fáa eitt hugskot, nakað heilt annað er at gera tað til veruleika, so var tað ikki fyri tann stóra herin av fólki, sum nú er uppi í, so hevði onki av hesum verðið av nøkrum, sigur Steintór.



*Ein rættiliga festival skal hava okkurt til øll, tí vit eiga øll festivalin, sigur Steintór Rasmussen, samskipari á Summarfestivalinum, sum verður í Klaksvík komandi vikuskifti*

### Ov gott til at vera satt

Fartelefonin hjá Steintór hevur tagt í fleiri tímar í dag, og tað tekur hann sum eitt gott tekin. Alt gongur mest sum av sær sjálvum í løtuni, ja sjálvt veðurgudarnir hava neyvan verið í betri summarhýri.

- Hetta er næstan ov gott til at vera satt, sigur Steintór og hyggur upp í luftina. Veðurfrøðingarnir siga, at veðri fer at halda, so vit hava ongan plan B og eg trúgvi heldur ikki , at nakar hevur hug júst nú at ganga og hugsa um, hvussu man best surrar pallar og ljóðføri føst í ódnarveðri

Atgongumerkjasøðlan gongur fínt, NFÍ hevur keypt ein pylsuvogn og 25 borð og stólar, sum nú verða sett kring festivaløkið, og festvalbólkurin er í ferð við at innrætta seg á høvuðsskrivstovuni í hølunum hjá Føroya Tele niðri Við Sandin. Har koma bólkarnir eisini at halda til undan konsertunum, og aftaná bíðar fiskasúpan til teir niðri í kappróðrarneystinum.

### Rætta løtan

Hugskotið við einum summarfestivali í Klaksvík er ikki nýtt. Longu í 2001 vóru ítøkiligar ætlanir um at hava ein festival úti í Grøv, men av ymsum orsøkum var ætlanin slept. Men tað var hugskotið ikki.

- Tað hevur alltatíðina verið avgerandi fyri okkum at koma væl frá byrjan, og tí gjørdi vit av at bíða fyri at fáa tað neyðugu tíðina til tað og til rætta løtan var har, sigur Steintór. Hann heldur tað vera eitt sindur ringt at siga um hetta hevur verið strævið, tí tú loysir trupulleikarnar so við og við, og gloymir, hví teir vóru trupulleikar. Burtursæð frá tí fíggjarliga, sum altíð er tungt at fáa at hanga saman, heldur Steintór at marknaðarføringin hevur verið ein tann størsta avbjóðingin.

- Tað er eitt sindur trupult at marknaðarføra nakað, sum ongantíð hevur verið fyrr. Vit hava jú onki at sipa til, ongar myndir frá árum frammanundan, og hvat tú nú annars brýkar í lýsingarátøkum. Tú ivast alltíðina í, hvussu tú skalt fortelja fóki, hvat tey kunnu vænta, og vit ivast framvegis í, um boðskaprin er komin fram, sigur Steintór.

### Fólkið eigur festivalin

Tað, fólk fyrst og fremst kunnu vænta, er ein rúgva av góðum tónleiki á nógum ymsum pallum runt um í býnum. Runt um sjálvan tónleikin verður eisini allatíðina ymiskt undirhald á skránni, har eitt tað mest forvitnisliga ivaleyst verður, tá Trøllapætur og Omman koma dettandi í fallaskíggja úr 3 km hædd niður úr eini tyrlu.

- Ein rættilig festival, sum varar í fleiri dagar, skal hava okkurt til øll, tí vit eiga øll festivalin. Fólk skulu sjálvi sleppa at velja, hvat tey hava hug at lurta eftir og so koma og fara, sum tey hava hug. Og eitt afturat - ongum nýtist at stinga hondina langt niður í lumman fyri at fáa ráð til at vera við, sigur Steintór, sum fegin vil nýta høvi at takka øllum teimum mongu sum hava æruna av, at Summarfestivalin 2004 í Klaksvík nú er viðð at við at verða veruleiki.

# Verthússangur við Ola Nordskar

**Norski gittarmaðurin og vísusangarin Ola Nordskar fer at vera við til at byrja og enda Summar Festivalin 2004.**

Ola Nordskar fer at syngja í Roykstovuni í Klaksvík hóskvøldið og sunnukvøldið, og fríggjakvøldið verður føroyavinurin at hoyra í Klaksvíkar Klubba.

Ola Nordskar hevur givið tvær fløgur út og hevur í nógv ár sungið og spælt á verthúsum og til smærri tiltøk runt um í Noregi og í Íslandi. Eisini hava fleiri av hansara sangum verið at hoyrt í norska útvarpinum.

45 ára gamli nordmaðurin er kendur fyri sítt hegni sum lag og orðasmiðjur. Røddin er eitt sindur hás og eyðkend, og framburðinum minnir ikki sørt um Joe Cooker og Tom Waits. Orðini eru oftani rámandi samfelagslysingar, men miseydnaður kærleiki og vakrar gerandislýsingar er eisini partur av skaldsliga samleikanum hjá norska trubadurinum.





*Norski vísusangarin Ola Nordskar fer at spæla í Klaksvík í sambandi við Summar Festivalin*

### Týtt føroyskar sangir

Ola, sum nærum á hvørjum summari hevur vitjað í Føroyum, skilur føroyskt somikið væl, at hann hevur umsett fleiri Frændur sangir til norskt. Samstarvið og vinalagið við frændurnar er eisini ítøkiligtgjørt á Kærleikans Vallaraheimi hjá Millum Frændur, har tveir av sangunum hjá norðmanninum På Armen Min og Mitt land eru latnir í føroyskan tónleikabúna.

Tey sum fara at lurta eftir Ola Nordskar kunnu vænta sær sangir á norskum, enskum og hvør veit - møgulig roynir hann seg eisini á føroyskum, tá ið hann sum eitt áhugavert íkast til Summar festivalin fer at syngja og undirhalda í ølstovunum í Klaksvík.



*Frá nýggja tjaldingarplássinum í Klaksvík er frálíkt útsýni út yvir Borðoyavík og vøkru viðarlundina úti í Grøv*

# Tjaldingarplássið úti í Grøv klárt

**Ferðafólk og festivalgestir, sum leita sær til Norðoyggjar hava fingið enn ein møguleika at gista í Klaksvík, nú nýggja tjaldingaplássið omanfyri vøkru viðarlundina úti í Grøv er við at verða klárt**

*Anna V. Ellingsgaard,*
*anna@sosialurin.fo*

Christian Olsen, leiðari á kunningarstovuni í Klaksvík gongur í løtuni og leggur seinastu hond á úti í Grøv á nýgja tjaldingarplássinum. Fyri nøkrum døgum síðani kom toilettvognurin, sum kommunan hevur keypt, og nú skulu bara setast nakrar skrellispannir upp - so er púra klárt at taka ímóti gestum.

Upprunaliga var ætlanin, at tjaldingargestirnir skuldu hava atgongd til w.c., brúsu og tekøk í barnagarðinum Fjallafípuni, ið liggur við síðuna av tjaldingarplássinum.Men hetta varð av ongum, tá kommunan gjørdi av at barnagarðurin ikki fór í summarfrí, og so varð neyðugt at fáa ein toilettvogn til vega.Tað tók eitt sindur longri enn vænta at fáa vognin til landið, sigur Christian, men nú er hann so komin at standa, har hann skal.

### Gott pláss

Í vogninum eru 2 w.c við ókeypis atgongd umframt 2 brúsur vaskimaskina og turkitrumla, sum gestirnir kunnu nýta umvegis eina myntskipan.

Á tjaldingarplássinum verður pláss fyri umleið 30 teltum í vanligari støðd, og sunnanfyri Fjallafípuna verður pláss fyri eini 10 húsvognum.

Eitt vaktarfólk fer at halda eftirlit við tjaldingarplássinum, sum annars verður opið alt døgnið

Til ber at bíleggja sær pláss á tjaldingarlássinum við at venda sær til Norðoya Kunningarstovu á tlf. 45 69 39

Kostnaðurin er 50 kr. um døgnið fyri hvønn persón.

# Fyrireikingarnar ganga væl

**Nú verður seinasta hond løgd á arbeiðið at gera festivaløkið í Klaksvík liðugt, og forsølan hevur rættiliga tikið dik á seg**

Í góðveðrinum mánadagin vóru nógv fólk til arbeiðis á festivaløkinum hjá Summar Festivalinum. Elektrikarar, arbeiðsmenn hjá kommununi og onnur stríddist við at fáa ymisk viðurskifti upp á pláss, so at festivalurin kann haldast.

Stóra útitiltakið leygardagin verður hildið á einum øki, sum ikki áður hevur verið brúkt til tónleikaframførslur, men sum er sera væl egnað til tað.

Býargartnarin hevur í eina tíð arbeitt við bønum, so hann verður góður at ganga og sita á undir festivalinum, og har sær bæði lokkandi og grønt út í hesum døgum.

Nú er streymkaðal lagdur til pallin, so at stóra ljóðanleggið, sum verður sett um, kann spræna tónarnar út í allar ættir.

Og síðani skal pallurin gerast liðugur, ljóðtøknin setast upp, og leygardagin verður alt klárt at taka í nýtslu, tá ið 14 bólkar og einstaklingar fara at spæla á stóru útikonsertini.



*Arbeiðsmenn hjá Klaksvíkar kommunu arbeiddu í góðveðrinum mánadagin á festivaløkinum*

## Veðurmenn lova gott veður

Forsøgnin hjá veðurmonnunum á DMI siga, at veðrið verður stak gott um vikuskiftið. Roknast kann við heitum veðri, lítlum vindi og sólskini

Umstøðurnar at halda fyrsta Summar Festivalin kunnu fara at gera so góðar, sum tær yvirhøvur kunnu gerast.

Veðrið hevur ein týðandi leiklut til slík tiltøk í Føroyum, og fáa veðurmenninir á Dansk Meterologisk Institut rætt, so verður av besta veðrið um vikuskiftið.

Bæði fríggjadagin og leygardagin siga teir frá turrum veðri, lítlum vindi og til tíðir sólskini. Hitin fer at nærkast teimum 20 hitastigunum.

Hetta er søtur musikkur í oyrunum á teimum, sum skipa fyri, og teimum, sum ælta sær á Summar Festivalin, har tónleikur fer at ljóma í fýra dagar bæði undir taki og opnum himli.

## Olivant live av festivalinum

Føroya Tele hevur vent sínum webkamera í Klaksvík ímóti festivaløkinum, og nú ber til at fylgja við tí, sum hendir á festivaløkinum, umvegis Olivant.fo

Næstu dagarnar verða nógvar fyrireikingar gjørdar á og kring Vágsbø, har stóru útikonsertin verður leygardagin. Pallurin er langt síðani komin upp at standa, men nógv annað skal gerast næstu dagarnar.

Føroya Tele hevur eitt sokallað wemkamera í Klaksvík og plagar at vísa útsýnið út eftir vágni og móti Kunoyarnesi. Men nú er hetta kamera flutt, so at tað tekur myndir av festivaløkinum hjá Summar Festivalinum.

So har ber nú til at fylgja við, meðan seinastu fyrireikingarnar verða gjørdar til stóra tónleikatiltakið.

Webkameraið sæst á heimasíðuni www.olivant.fo

## Fívil á festivali

Tað skal eisini verða stuttligt hjá teimum allarminstu at fara á Summar Festival í Klaksvík.

Tí fer fer festligi fívilin Hannibal eisini verða ímillum festivalgestirnar í vikuskiftinum.

Hvat kostiligi klovnurin fer at gera og undirhalda vita vit ikki enn, men hann fer at verða á pallinum eina løtu saman við Trølla Pæturi, og seinni fer hann vísa seg ímillum børnini og fáa tey at undrast og stuttliga sær á Festivaløkinum.

## Pláss eru eftir til Hensley

Eitt tað mest forkunnuga tiltakið á øllum Summar Festivalinum er ein sonevnd workshop við bretska tónasmiðinum Ken Hensley.

Hetta tiltak verður í Atlantis fríggjakvøldið kl. 21.00, og har fer Hensley at greiða frá sínum tónleiki, hvussu hann skrivaði ymsar sangir, og hvat hann hevur lagt seg eftir í sínum tónlistarliga arbeiði

– Eg havi fyrireikað meg til at spæla nakrar sangir og greiða frá, hvussu eg skrivaði teir. Eg ætli mær eisini at tosa eitt sindur generelt um at komponera, og fólk eru eisini sera vælkomin at seta mær spurningar, sum fari eg at svara so gott, sum eg kann, sigur Ken Hensley.

Hann var maðurin, sum skrivaði kendastu sangirnar hjá bretska rockbólkinum Uriah Heep, og millum hesar eru July Morning, Easy Livin', Stealin', The Wizard og tann kendasti av øllum Lady in Black, sum er týddur til føroyskt og kallast Hesir Brimbardu Klettar.

Tiltakið við Ken Hensley er ein lívskjansur at uppliva hetta virda tónaskald tætt og erligt. Nøkur atgongumerki eru eftir til hetta tiltakið, har atgongdin er avmarkað.

Atgongumerkini fáast á Shell-støðini í Klaksvík og á Kunningarstovuni í Havn.